# kni í brúk í vetrarhaldinum

við tólum, sum m.a. máta vind, hita í luftini og hita á koyribreytini. Útgerðin er bundin í eina teldu, sum skrásetur upplýsingarnar. Eisini er ísbilurin útgjørdur við einum GPS'ara, sum vísir, hvar bilurin er staddur.

Mátingar eru gjørdar á øllum landsvegum í landinum. Sum dømi kann nevnast, at mátingar eru gjørdar á vegastrekkinum av Hálsi í Tórshavn til maskinmiðstøðina hjá Landsverki í Kollafirði. Mátingarnar vístu, at stórur munur kann vera á hitanum í luftini og á hitanum á koyribreytini.

Á Sundi var hitin í luftini t.d. máldur til 6 hitastig, og koyribreytin til 0 hitastig. Hetta sigur so mikið sum, at eingin trygd er fyri, at hálka ikki kann vera á vegnum, sjálvt tá ið hitið er í luftini. Við nýggju tøknini ber til at geva neyvari fráboðanir um koyrilíkindi ymsa staðni í landinum, av tí at veðurstøðirnar máta hitan á sjálvari koyribreytini.

Landsverk hevur nú samanlagt 21 veðurstøðir kring landið, sum veita upplýsingar um m.a. hita, vind, ætt og hvirlur hvørt 10. minutt alt samdøgrið. Av teimum 21 veðurstøðunum hava 9 nú eisini vevmyndatól, soleiðis at til ber at síggja støðuna á vegnum á heimasíðuni landsverk.fo ella í fartelefonini, um ein nýtir nýggju wap-tænastuna.

Tøkniliga menningin hevur nógvaferð á, og hevur Landsverk lagt seg eftir at hava fingurin á pulsinum. Arbeitt hevur verið miðvíst fram ímóti at fáa eina betri kunning um veðrið í vetrarhálvuni. Málið hevur verið og er framhaldandi, at øll, sum hava veðurupplýsingar fyri neyðini, skulu fáa fatur á hesum so skjótt og lætt sum yvirhøvur til ber, og nær á samdøgrinum, tað skal vera.




### Her og nú kunning um veðurlíkindini

Setur tú teg í bilin árla á morgni ein kaldan vetrardag við Gjógv, áðrenn útvarpið er byrjað, og ert tú í iva, um tað man vera hált um Gjáarsskarð (ein veðurstøð við vevmyndatóli verður nú sett upp her), ja so ber tað nú til at fáa at vita, hvussu koyrilíkindini eru um Gjáarsskarð, um tú hevur eina fartelefon hjá tær við netsambandi. Tú skrivar bara www.lv.fo/m/, og fær síðani koyrilíkindini frá veðurstøðini við Gjáarskarð beinleiðis inn á fartelefonina umvegis wap-tænastuna hjá Landsverki. Tað sama, um tú skalt til útróðrar ella á sjógvin, so kanst tú fáa aldumátingar umvegis somu wap-tænastu. Ella kanska tú ert staddur í Kastrup floghavn og vilt vita, hvussu floglíkindini eru vesturi í Vágum. Tá kann veðurstøðin á Vatnsoyrum siga tær ætt og vindmegi, og enntá vísa tær vevmynd av veðrinum á Vatnsoyrum. Tænastan er sostatt óheft av tíð og staði í dag, umframt at upplýsingarnar eru neyvari, aktuellari og lætt atkomuligari.

### Altíð neyðugt at hugsa sjálvur – fyrr sum nú

Sambært Landsverki er nýggja fráboðanin um koyrilíkindini minst líka álítandi sum tann frammanundan, um nakar skuldi ivast í tí. Hon er bara øðrvisi. Nú fært tú vitan um koyrilíkindini á einum ávísum staði og ikki fyri eitt strekki ella alt landið samlað, sum fólk eru von við at fáa. Bilførarar mugu nú, sum fyrr, taka ábyrgdog sjálvir meta um støðuna millum veðurstøðirnar og lesa vegin av, so at skilja, at verður boðað frá ávísum koyrilíkindum á einum staði, har veðurstøðin er, so kann hetta vera umboðandi fyri eitt størri øki/strekki, men skalt tú sjálvsagt ongantíð bara líta á tað.

### Umskipan av vetrarhaldinum: Vinterman hevur kalda yvirlitið

Eitt er, hvussu Landsverk boðar Føroya fólki frá koyrilíkindum. Nakað annað er, hvussu alt tað operativa handan leiktjaldið fer fram, t.e. hvussu vetrarhaldið hjá Landsverki øll hesi árini hevur arbeitt fyri at halda vegirnar farbarar sum longst. Tað er ikki bara sjálv fráboðanartænastan, sum nú aftur stendur við eitt vegamót, men eisini sjálvt vetrarhaldið, sum nú er umskipað, trimmað og nútímansgjørt.

Ein arbeiðsbólkur hevur í eitt tíðarskeið arbeitt við at umskipa vetrarhaldið hjá Landsverki, so at hetta arbeiðið verður effektiviserað og moderniserað. Drúgvu royndirnar, nýhugsan og fjølbroytta serfrøðin í arbeiðsbólkinum skal tryggja eitt álítandi og framskygt vetrarhald. Higartil hevur verðið arbeitt soleiðis í vetrarhaldinum, at fólk eru farin til arbeiðis kl. 5 á morgni og hava í mongum førum arbeitt til kl. 21. á kvøldi. Landsvegirnir hava veriðhildnir farbarir millum kl.07.00 og 21.00 yrkadagar og millum kl.08.00 kl.21.00 sunnu- og halgidagar. Í serligum førum hava vegirnir eisini verið saltaðir og ruddaðir fyri kava eftir kl. 21. Tað hevur t.d. verið í sambandi við neyðsynjarørindi ella aðrar serligar umstøður. Landsverk hevur í hvørjum einstøkum føri mett um, hvørt umstøðurnar hava verið soleiðis háttaðar, at neyðugt hevur verið at skipa fyri salting ella kavarudding í úrtíð.

»Vit eru komin til enn eitt vegamót í vetrarhaldssøguni, har tøk- nin aftur bjóðar okkum av«, segði Finnleif Durhuus, rakstrarleiðari á vegadeildini, á vetrarfundinum, sum sipaði til eina nýggja fyrisitingarliga skipan í vetrarhaldinum, kallað »Vinterman«, sum væntandi verður tikin í nýtslu í januar í komandi ári.

»Vetrarhaldið skal skipast soleiðis, at tað tænir samfelagnum best við atliti at trygd og framkomuleika.« Soleiðis ljóðar visjónin fyri vetrarhaldið hjá vegadeildini, og arbeitt verður miðvíst eftir at røkka hesi visjón. Í londunum kring okkum hava tey í fleiri ár nú nýtt »Vinterman« skipanina í vetrarhaldinum, og lata tey væl at. Ísland fekk eina tílíka skipan fyri 8 árum síðani.

Nú er so fyrireikingararbeiðið fariðí gongd her heima. »Vit vænta, at skipanin kemur upp at koyra 1. januar 2010, um alt gongur, sum ætlað. Nýggjar mannagongdir skulu gerast, og fólk skulu eisini læra at umsita skipanina o.s.fr.,« sigur Heini Eysturoy, deildarleiðari á vegadeildini á Landsverki. Nýggjur bygnaður er gjørdur isv. skipanina, og eru tað nú økisleiðarar, sum seta eina vaktarskipan upp fyri allan veturin og seta fólk í vakt eftir tørvi.

Nýggi bygnaðurin fyri vetrarhaldið á Landsverki skal tryggja eitt gott og effektivt vetrarhald.

»Vinterman« skipanin, sum økisleiðararnir skulu stýra, skal nýtast til planlegging og uppfylging av vetrararbeiðinum. Tá verður eisini vetrarhaldið hjá Landsverki meira »automatiserað«, og tað verður lættari at leita fram hagtøl og dokumentatión.

### Saltstrategi og vegaflokking

Í sambandi við umskipanina og effektiviseringina av vetrarhaldinum eru saltstrategiir eisini gjørdar. Vegir eru nú býttir í 4 ymiskar vegaflokkar alt eftir, hvar flest bilar koyra og hvønn týdning farleiðin annars hevur í sambandi við vinnuna, skúlar og fyri landið sum heild. Greiðar mannagongdir eru gjørdar fyri, hvussu saltast skal í ymisku vegaflokkunum.

Hesar broytingar fara tó ikki at merkjast komandi vetur. Tað liggur longri frammi í tíðini. Um mannagongdina í sambandi við salting er at siga, at Landsverk roynir altíð at salta so væl, at ferðslan gongur so trygt, sum til ber. Roynt verður altíð at halda vegirnar farbarar sum longst.

Komandi vetur er ætlanin hjá Landsverki at royna nýggjar saltingarhættir, t.d. við at nýta fuktað salt og saltlaka. Hesum hava tey góðar royndir við í grannalondunum. Serliga tá ið tú hevur bæði hálku og vind, kunnu fyrimunir vera við at nýta saltlaka, ið heftir meira at vegbreytini enn leyst salt, ið kann blásast av vegnum, áðrenn tað fær bast hálkuni. Saltlaki roynist eisini betri í sambandi við svarthálku.

### Ferðslutrygd - felags ábyrgd

At enda enn ein áheitan til allar bilførarar. Landsverk ger sítt fyri at tryggja framkomuleika og veita neyðuga kunning til fólkið, men nyttar hetta alt einki, um fólk ikki fyrst og fremst taka ábyrgd sjálvi, og eitt nú skoða bilin væl í góðari tíð, koyra varliga eftir umstøðunum og fara frá húsum í góðari tíð. Tað eru alt ov mong, ið taka kjansir í koyring á vetri og bíða ov leingi at fáa vetrardekkini á. Tað er heldur ikki bara hálka, sum elvir til ferðsluóhapp um veturin, men eisini regn og myrkur. Høvuðsorsøkin er tá nógv skerda sýnið. Á Landsverki vóna tey, at fólk altíð royna at kunna seg væl um koyrilíkindini.



## Góð ráð í vetrarferðsluni

- Far altíð heimanífrá í góðari tíð
- Kanna altíð koyrilíkindini (www.lv.fo/m/)
- Fá røttu dekkini til veturin á í góðari tíð
- Minst til fartelefonina og syrg fyri, at hon er lødd
- Skava kava og ís av bilrútum, speglum og lyktum, áðrenn farið verður avstað
- Koyr altíð varliga
- Halt frástøðu til bilar frammanfyri
- Koyr í bilsporunum á vegunum
- Hav báðar hendur á róðrinum. Tað er lættari at rætta bilin upp, um tú glíður
- Hav altíð eitt teppi við í bilinum. Um bilurin verður fastur í kavanum, er altíð gott at kunna halda seg heitan, til hjálpin er á staðnum